# Hesin er neyvan klárur




Skeltið á garðinum sigur frá, her standa bilar, sum eru klárar at verða heintaðir av einum bilverkstaði í Havn. Antin hava mekanikararnir givið hendan bilin upp, ella stendur hann bara skeivt parkeraður.
*Mynd: nym.fo*

# Dukkan hon kann gráta




Tað gekk einki serligt hjá John Terry í finaluni í Champions League kappingini. Finalan endaði við brotsspørkum, og John Terry, liðformaður hjá Chelsea, gleið, tá ið hann skuldi skjóta avgerandi sparkið. Endin var, at Manchester United vann kappingina. Eftir dystin græt John Terry, og tárini trillaðu eftir kjálkunum. Nú heldur onkur, at tað hevði verið upp á sítt pláss einari John Terry dukku.

# Øðrvísi kummur

Um onkur kundi hugsa sær eiina øðrvísi kummu, sum eru nøkur dømi um tað her. Kumman nýtist ikki endiliga at verða hvít og skínandi blank.















# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Hvussu var lýsingin hjá Danske Spil?**
So tað bleiv altso kontra til Sølva?
Útvarp Føroya (eftir at hava fingið boð um, at Sølvi Vatnhamar hevði skorað trý mál í sama dysti

**So er hjá teimum flestu**
Bæði liðini vístu, at tey hava trupult við at vinna sær trý stig í hvørjum dysti.
3-2 í Sjónvarpinum

**Nýtt frá Royns kolasølu?**
Hann var ikki greiður yvir, at hann er so væl úr bergi brotin
Vikublaðið

**Báturin lá eftir**
Báturin hevur tveir Volvo Penta motorar, sum eru 435 hestar hvør, og teir hava eina mestu ferð upp á heilar 38 mál
Sosialurin

**Hvør?**
Hvakbingar fara at grava í nýggjum námi
Olivant

**Fødd fleiri ferðir?**
Vinnuskráin varð fyrstu ferð borin í heim 10. Juni 2008.
Vinnuvitan

**Nýggj bygd ella kommunusamanlegging?**
Mikudagin í næstu viku verður seminar á Kambsdali um pelagiska vinnu 2010-2025, skrivar Uflafjarðar Kommuna á heimasíðu síni
Dimma

# Mr. Bean stjóri í Bank of England



Bretar settu ivaleyst í hálsin, tá ið blaðið The Times í vikuni skrivaði, at Mr. Bean verður nýggjur stjóri í Bank of England. Fólk hugsaðu ivaleyst um kenda filmsfigurin hjá Rowan Atkinson, men tað var ikki tann Bean, sum varð blivin bankastjóri. Tað var Mr. Charlie Bean, sum frammanundan var ein leiðandi fíggjarmaður í Bank of England.